gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

### Mist stev og mið!

Líkt er til, at Tjóðveldisflokkurin treyðugt vil halda samgonguskjalið. Samstundis vísir henda støðan, at flokkurin veit ikki, hvat tann vanligi føroyingurin hevur til lívsins uppihald. Og brævskrivingin millum landsstýrismenn vísir, at áralagið í samgonguni, sum annars tosar um at fara á val sum “ein maður”, er stak vánaligt!

Henda samgongan setti sær m.a. fyri at lækka skatta- og avgjaldstrýstið. Men tað bleiv einans til 200 krónur um mánaðin hjá einum lágtløntum lønarbeiðara! Og nú er tjóðveldisflokkurin í øðini, tí fólkaflokkurin atkvøður fyri einum uppskoti hjá javnaðarflokkinum at lækka bensinprísin nakað.

Tá landskassin hevur met yvirskot á hvørjum ári, skuldi tað annars verið lagað manni at lætta eitt sindur um skattabyrðuna, uttan tað nervar landsbúskapin og fær hann upp á kók. Men gakk. Javnaðarflokkurin – og eisini sambandsflokkurin – hevur havt fleiri uppskot um at lækka skatta- og avgjaldstrýstið nakað. T.d. við lækka vanliga skattin, lækka oljugjaldið, lækka bensinprísin og varðveita rentufrádráttin á 48 prosentum. Men tjóðveldisflokkurin setir føtur í spennið, og nú hartar hann fólkaflokkin fyri at hava tikið undir við uppskotinum at lækka bensinprísin!

Allir tilvitandi føroyingar eru samdir um, at vit skulu reka ein varnan búskaparpolitikk, og nú privatu íløgurnar eru stórar, skal tað almenna halda aftur. Men føroyingurin skal eisini kunna liva í Føroyum. Kanningarnar hjá fakfeløgunum vísa eisini greitt, at tann vanligi føroyingurin hevur ikki ein tjans at fáa endarnar at røkka saman, so tað átti at verið góður tjóðveldispolitikkur at veitt tí vanliga lønarbeiðaranum nakrar smávegis sømdir. Men henda politikk hevur tann “nýggi tjóðveldisflokkurin” gloymt!

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

# Vaktu brandmeistara á 50 ára degnum



*Petur Seloy, brandmeistar, í fullari mondering*

Í gjár fylti Peter Seloy, brandmeistarin í Havn, 50 ár. Petur Seloy tók við sum brandmeistar fyri umleið fýra árum síðani.

Hóast dani, so er Petur Seloy kortini føroyingur, tí bæði mamma og pápin hava føroyskan uppruna.

Pápin, Knút, er sonur Valborg hjá Knút, gamla Knút, tann kendi skómakaranum í Havn, ið hevði skógsmiðju í Arnes Minde í Bringsnargøtu. Hann var ættaður úr Funningi.

Peter Seloy var brandinspektørur í Kalundborg, áðrenn hann kom til Føroya í 1997.

Nógv er hent á brandstøðini í Havn hesi seinastu árini. Nógvir bilar og nógv útgerð er skift, tí tann gamla var niður slitin, og býráðið játtaði ikki nógvar pengar til hesa útskifting knøppu árini fyrst í nítiárunum.

Til 50 ára dagin hjá brandmeistaranum høvdu sløkkiliðsmenninir gjørt sítt ítarsta til at fáa gamla Triangel sløkkiliðisbilin frá tríatiárunum at koyra aftur. Hesin bilur kom til Føroya í 1962, men hann hevur ikki koyrt tey nógvu seinastu árini.

Fyri nøkrum árum síðani játtaði Tórshavnar býráð tó pengar til at seta bilin í stand fyri, og hava m. a. næmingar á Tekniska skúla í Havn umvælt motorin. Smiðir á brandstøðini hava staðið fyri plátu- og málaraarbeiðinum annars.

Nú bilurin aftur er komin at koyra, hevur hann fingið somu nummarplátu sum hann fekk í 1962, nummarið Fø 2.073.

Bilurin var longu um tríati ára aldur, tá hann varð keyptur til Føroya í 1962. Men talan er um ein serligan bil, hann er dansktbygdur Triangel, og er helst tann einasti brandbilur av sínum slag, sum er varðveittur í ríkinum.

Í gjáramorgunin kundu so havnarborgarar síggja gamla bilin – við flagginum við áskriftini »útryknin« koyra gjøgnum býin við øllum hinum sløkkiliðsbilunum aftanfyri.



*Gamli Triangelbrandbilurin uttan fyri hjá brandmeistaranum gjáramorgunin saman við øðrum sløkkiliðsbilum*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Samráðingarnar hjá Pedagogfelagnum ikki byrjaðar

**Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Kommunusamskipan Føroya arbeiða í løtuni við at seta eina nevnd, sum skal umboða allar kommunurnar undir samráðingunum við Føroya Pedagogfelag. Hetta skal verða komið uppá pláss í vikuni og samráðingarnar kunnu byrja tá**

*Turið Kjølbro*



*– Føroya Pedagogfelag fegnast um, at ein dagstovnalóg, sum tryggjar børnini, varð gjørd samstundis sum kommunurnar yvirtóku dagstovnaøkið., sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag.*
*Myndin er tilvildarliga vald*

Eitt verkfall og fimm vikur eru síðani, sáttmálin hjá Føroya Pedagogfelag fór úr gildi, og enn er dagurin, tá ið samráðingarnar skulu byrja ikki ásettur. Fyri fyrstu ferð skal Føroya Pedagogfelag samráðast við kommunurnar, og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Kommunusamskipan Føroya arbeiða í løtuni við at seta eina felagssamráðingarnevnd, sum skal umboða allar kommunurnar undir samráðingunum. Sum skilst skal hetta verða komið uppá pláss í vikuni og samráðingarnar kunnu byrja tá. Frá løgmansskrivstovuni hevur Pedagogfelagið fingið at vita, at kommunur hava rætt at samráðast vegna sjálvsognarstovnarnar.

At Føroya Pedagogfelag skal samráðast við kommunurnar um sáttmála fyri teir 500 limirnar, sum arbeiða á barnagørðum, vøggustovum, frítíðarskúlum og sum dagrøktarar, hevur felagið tikið til eftirtektar - hóast felagið ongantíð hevur dult fyri, at tað átti at verið Fíggjarmálastýrið, ið skuldi sitið hinumegin borðið. Hesin veruleikin er ikki orsøkin til, at felagið fór í verkfall fyri tveimum vikum síðani. Tað var framferðin og málsviðgerðin í málinum, felagið fýltist á. Løgmaður ásannaði tá ið verkfallið var av, at málsviðgerðin ikki hevði verið nøktandi og henda úrskurð er Føroya Pedagogfelag nøkt við.

– Vit vónaðu til tað síðsta, at tað ikki varð neyðugt at fara út í verkfall. Longu í februar mánaði settu vit okkum í samband við allar partar fyri at avgreiða spurningin um samráðingarrættin áðrenn sáttmálin fór úr gildi. Trupulleikin var jú, at felagið og avvarðandi myndugleikar ongantíð høvdu tosað saman, og eftir brøv og rykkjarar og einki hendi høvdu vit einki annað val enn at fara í verkfall, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag.

### Arbeiðið ikki virt

Álitið hjá Føroya Pedagogfelag á landsins ovastu myndugleikar, aðalstýri og politikarar, fekk eitt skot fyri bógvin av trætuni um samráðingarrættin. Og álitið er eftir øllum at døma ikki endurvunnið.

– Tá ið eitt so stórt mál verður so illa úr hondum greitt, kann eg ikki siga annað enn at eg havi mist álitið á samgonguna. At kommunurnar yvirtaka økið er nýtt fyri allar partar og feilir kunnu henda. Men tað sum hendi í sambandi við trætuna var, at eingin vilji var at loysa knútin, tá ið vit fingu frænir av feilinum. Og okkara fakfelag hevur verið ógvuliga nógv úti um seg alla tíðina alla staðni í sambandi við samráðingarrættin, so vit ivaðust ikki eina løtu í hvønn vit skuldu samráðast við. Hetta kom jú líka óvart á kommunurnar. Eg vóni bara, at politikararnir hava lært, at tá ið ein lóggáva verður gjørd, sum førir við sær stórar broytingar, at alt er í lagi. Vit eru ógvuliga glað fyri, at ein dagstovnalóg, sum tryggjar børnini, varð gjørd samstundis, tá ið kommunurnar yvirtóku dagstovnaøkið. Tað eigur Helena Dam á Neystabø rós fyri. Men í hesi lóg eiga sáttmálasamráðingarnar hjá teimum sum arbeiða við børnum eisini at verða tryggjað. Tað varð ikki gjørt. Og øll henda trætan er eitt skúladømi um, hvussu ikki eigur at verða gjørt, sigur Carita Björklund, sum setir spurnartekin við um arbeiðið hjá pedagogum yvirhøvur verður virt.

### Heildarkend krøv

Enn hevur Føroya Pedagogfelag ikki fingið mótkrøv frá kommununum, og Pedagogfelagið gongur út frá, at Fíggjarmálastýrið hevur sent krøvini, sum tað handaði har 1. februar víðari til kommunurnar. Forkvinnan í Føroya Pedagogfelag torir ikki at siga, hvussu samráðingarnar fara at ganga.

– Tað er nýtt fyri kommunurnar at samráðast við okkum, so ilt er at meta um, hvussu fer at vera. Hinvegin fyrireika vit okkum á sama hátt sum vit altíð hava gjørt.

Limirnir í Føroya Pedagogfelag arbeiða bæði á stovnum undir landinum og undir kommununum, og tí eru krøvini til ein nýggjan sáttmála heildarkend. Styttri arbeiðstíð og longri frítíð, umframt at lønin verður prístalsviðgjørd og at lønin til leiðarar á dagstovnum verður betri, eru nøkur av krøvunum. Eisini ynskir Pedagogfelagið ein einfaldari sáttmála, har eitt nú viðbøtur verða tiknar inn í lógina.


